# PAR DYRNAR



**HITTAST**

*Johan Dahl skal hitta tann máttmikla Medvedev í Moskva*

føroyskum vinnulívi og okkara oljuleitiøki. Eisini hvørjar tankar vit hava um framtíðar leiting her og í hvønn mun eitt nú eitt felag sum Gazprom kann hava áhuga í at vera partur av leitingini. Antin til eina komandi oljuútbjóðing ella nú, tá vit fara at marknaðarføra ein »open door« møguleika, har feløg kunnu koma inn og hyggja at ávísum økjum, sum longu hava verið útboðin og kanska hava áhuga fyri at kanna og bora í teimum økjunum.

## Heri Ziska við

*– Kann hetta merkja, at vit kanska fara at síggja russiska Gazprom vera part av framtíðar olju- og gassleitingini við Føroyar?*

– Tað er ilt at meta um enn, men at koma so langt sum at kunna um føroyska økið á høvuðsborgini hjá Gazprom er eitt stórt stig á leiðini. Jarðfeingi verður við á fundinum. Heri Ziska fer at greiða frá føroyskari oljusøgu, tí, sum er farið fram á landgrunnsøkinum og tí, sum liggur fyri framman. Eg síggi hetta sum ein gyltan møguleika at skapa áhuga hjá Gazprom og kanska øðrum feløgum í Ruslandi at bjóða uppá leitiøki í Føroyum í framtíðini, og tað kann bara vera positivt fyri føroyska vinnulív og føroyska samfelagið sum heild.

*– Nú síggja vit, at norska Statoil og Gazprom eru farin í samstarv. Vitandi at Statoil er rættiliga virkið í Føroyum kann tað tá hugsast, at hesi bæði feløgini eisini fara at finna fram til okkurt slag av samstarvi á føroyska landgrunninum, møguliga eisini saman við DONG og saman við føroyskum myndugleikum?*

– Tað eru vit sum myndugleiki, ið skulu skapa karmarnar fyri vinnuna, og tað er eisini tí vit hava samtykt eina lóg, sum sigur, at feløg kunnu søkja um leitiloyvi til ávís øki uttan, at ein nýggj útbjóðing skal gjøgnum løgtingið. Tað eru sjálvandi feløgini, sum mugu finna fram til samstarv. Bæði Statoil og DONG, sum hevur eitt samstarv við Gazprom í sambandi við eina gassleiðing úr Eystrasalti, kunnu sjálvandi hugsast at finna fram til okkurt samarbeiði her eisini.

Johan Dahl vísir á, at tað samstarv, sum longu er millum DONG og Damark og Rusland er so at meta sum eitt goodwill vit fáa lut í. Og so vil tíðin vísa, um hurðar latast upp fyri okkum eisini og har vit kunnu vísa flaggið og vísa okkara økið fram, sum vónandi verður eitt spennandi øki fyri bæði olju og gass í framtíðini.

gassolju, og tað kann gott vera, at henda vitjan kann lata upp hurðar fyri onnur føroysk virki so sum EFFO og MAGN og SEV og aðrar, sum kundu hugsað sær at fingið olju til vega frá slíkum sum Gazprom. Eg fari sjálvandi at kunna um alt hetta á fundinum, eitt nú hvussu okkara forbrúk er. Hetta er jú sera lítið í teirra høpi. Vit brúka kanska fyri eina milliard um árið, sum er sera lítið í Gazprom høpi. Kanska vitjanin tí eisini kundi verið ein duraopnari fyri, at vit kundu keypt bíligari olju enn í dag.

*– Sær tú nakrar trupulleikar og vandar í tí at víðka um okkara samstarv við russar eitt nú á oljuøkinum her í Norðuratlantshavi?*

– Tað dugi eg øgiliga illa at síggja nakran vanda í.

**»Vit mugu síggja hesa vitjan í einum vinnuligum høpi og sum ein fyrimun at sleppa at kunna um Føroyar sum ein møguleika hjá stórum feløgum at arbeiða í.**

JOHAN DAHL

## Keypa bíligari olju úr Ruslandi

Vinnumálaráðharrin heldur sjálvur, at eitt samstarv við Gazprom kann eisini gerast katalysatorurin til aðrar samstarvsmøguleikar.

– Tað er sjálvandi ilt at siga her og nú, hvat tað kundi verið. Men tað vit vita er, at Gazprom arbeiðir innan mong vinnulig øki og ikki bara innan olju og gass. Hyggja vit at Føroyum, so eru vit í dag sera bundin at bæði tungolju og vanligari

Olja er ein altjóða vøra. Og feløgini í hesi vinnuni eru altjóða feløg. Gazprom er jú eitt felag eins og onnur. Gazprom letur 70-80% av øllum gassinum til Europa. Vit 50.000 menniskju úti í Atlantshavi koma neyvan at hava nakran týdning í so máta. Vit mugu síggja hetta í einum vinnuligum høpi og sum ein fyrimun at sleppa at kunna um Føroyar sum ein møguleika hjá stórum feløgum at arbeiða í.

jan@sosialurin.fo